# Mjølnir krøkt av oddinum

**ÍF vann annað vikuskifti í slag torføran útidyst, og í løtuni tykist oddastríðið at gerast ein uppgerð millum TB og ÍF**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Stóri dysturin hjá kvinnunum hetta vikuskiftið var í Klaksvík, har ÍF vitjaði hjá Mjølni. Eftir at tær annars høvdu tapt fyri Drátti, gjørdu ÍF eitt ordans hál í Trongisvági seinasta vikuskifti, tá tær vunnu 3-0 á TB, og sunnudagin prógvaðu tær, at tann sigurin so avgjørt ikki var av tilvild.

Í einum dysti, har Mjølnir annars tók sær av fyrsta settinum, vóru tað nevnliga gestirnir, sum settu seg á tað heila, og við trimum tryggum sett-sigrum syrgdu tær fyri, at Mjølnir í øllum førum ikki enn kann rópa seg FM-biðil, tó at tær als ikki kunnu avskrivast í so máta enn.

Hóast sigurin hjá ÍF í Klaksvík, so førdi vikuskiftið við sær, at TB nú aftur er á odda. TB vann nevnliga sín dyst í Havn móti Fleyr við trimum settum móti ongum, og sostatt eru tær nú eitt sett betri enn ÍF.

Hóast TB hevur havt sínar trupulleikar, eins og ein ávís framgongd hevur verið at hóma hjá Fleyr, so var ongan tíð nakar ivi um, hvat liðið var hitt betra leygardagin. TB snøgt sagt vant burtur úr mótstøðuni, og tó at settúrslitini ikki øll vóru eins sannførandi, so var talan ongan tíð um nakran veruligan spenning um útfallið.

Seinasti dysturin hjá kvinnunum um vikuskiftið var í Hoyvíkarhøllini, har Dráttur vitjaði. Eftir heldur laka úrtøku fyrru hevlt av grundspælinum fekk Dráttur nakað av flogið við sigrinum á ÍF, og sunnudagin syrgdu tæi, at tær framvegis eiga at roknast við, tá tosað verður um heiðursmkeri. Við 3-1 sigrinum vann Dráttur seg nevnliga upp á sama stigatal sum Mjølnir, og tá stigini verða hálverað í endaspælinum verður munurin millum fýra tey fremstu soleiðis heilt lítil.



*Annað vikuskiftið í slag vann ÍF týdningarmiklan oddadyst, soleiðis at tær framvegis hava sama stigatal sum TB*
*Mynd: SáH*

## Flogbóltsúrslit:

**Meistaradeild kvinnur**
Fleyr-TB 0-3 (9-25, 16-25, 19-25)
KÍF-Dráttur 1-3 (18-25, 23-25, 27-25, 24-26)
Mjølnir-ÍF 1-3 (25-22, 18-25, 17-25, 19-25)

**Meistaradeild menn**
Fram-SÍ 3-1 (25-12, 23-25, 27-25, 24-26)
Mjølnir-ÍF 0-3 (17-25, 16-25, 15-25)

## Juanna kom ikki í endaspælið

Åbyhøj Volley spældi um vikuskiftið seinasta dystin í grundspælinum í donsku flogbóltsdeildini. Dysturin var ímóti Frederiksberg Volley, og skuldi Åbyhøj gera sær vónir um at koma við í endaspælið, so var kravið heilt einfalt ein sigur.

Úrslitið gjørdist, at Åbyhøj, sum var uttan Juannu S. Joensen á liðnum, tapti í einum jøvnum dysti, og harvið mugu Juanna og tær í Vár spæla um rættin til enn eitt ár í elitudeildini.

**-jm**

## Holte trygt víðari

Bárður Mikkelsen og liðfelagarnir í Holte staðfestu støðuna sum eitt av sterkastu liðunum í Danmark, tá teir um vikuskiftið spældu seinasta dystin í grunspælinum. Sum so hevði dysturin lítlan týdning, tí meðan Holte langt síðani hevur leikt seg víðari til endaumfarið, er Bedsted KFUM niðasta liðið í deildini, og sum helt gjørdist talan eisini um ein lættan dyst fyri Bárð og teir.

Sjálvur sigur Bárður, at teir fyri ein stóran part nýttu dystin sum fyrireiking til steypafinaluna, sum verður á skránni um eina viku, og at hetta partvíst eisini darvaði vanliga spælinum. Hvussu var og ikki, so endaði alt við einum tryggum 3-0 sigri, og so verður spennandi at vita, hvørt Holte í ár fer at hava størri hepni, tá steypafinalurnar vera á skránni.

**-jm**

# Eingin tekur ÍF

**Heldur ikki útidysturin móti Mjølni gav fuglfirðingum stórvegis trupulleikar, og spurningnurin tykist nú vera, hvørt nakað lið yvir høvur megnar at nerta ÍF**

**Mansflogbóltur**
*Jákup Mørk*

Í upptaktini til flogbóltsdystirnar um vikuskiftið skrivaðu vit millum annað, at skuldi nakar gera nakað við ÍF, so mátti tað verða Mjølnir, sum hesa ferð átti heimavøll móti oddaliðnum.

Í so máta má staðfestingin vera, at tað er eingin, sum tekur ÍF. Nú bert ein dystur er eftir at leika í grundspælinum – hann hevur ÍF heima ímóti Fram – hevur liðið framvegis fult stigatal, og enn er ikki eitt einasta sett farið framvið, og tað er veruliga nakað, sum ber boð um klassa.



*Heldur ikki Mjølnir fingu á heimavølli gjørt nakað sum helst við einaráðandi fuglfirðingarnar, og spurningurin tykist nú vera, hvørt nakað lið yvir høvur er ført fyri at nerta við oddaliðið*
*Mynd: SáH*

Sunnudagin var ikki tað stóra, sum Mjølnir kundi gera við fuglfirðingar. Tó at eisini klaksvíkingar hava styrkt um lið sítt í ár við útlendskum leikarum, so tykjast hesir ikki fella eins væl inn á liðið, sum nýggju leikararnir hjá ÍF gera. Og hartil og minst líka týdningarmikið, so er einki at ivast í, at ÍF hevur setrkasta kollektivið av føroysku mansliðunum í ár. Breiddin á liðnum er somikið stór, at avrikið ikki er tengt at einum ella tveimum leikarum, tí tað standa alla tíðina aðrir klárir at taka yvir, soleiðis at talan mest sum ongan tíð verður um nakran off-day, og hetta støðufesti ger, at hini liðini munnu hava lítlar og ongar vónir um at taka oddaliðið aftur.

### Harður dystur millum tey næstbestu

Er spenningurin um gullið sostatt longu horvin, so er hann framvegis sera stórur um, hvussu verður við næstu sessunum.

Her hava tað serliga veirð Mjønlir og Fram, sum hava gjørt seg galdandi, og hetta vikuskiftið nýtti Fram til at vinna seg upp um aftur klaksvíkingarnar. Mótstøðan hjá Fram var úr SÍ, sum enn ikki hevur megnað at bitið seg fast beint undir oddinum, hóast liðið á pappírinum átti at havt møguleikan til tess.

Hesin møguleikin eigur heldur ikki enn at avskrivast, tí hóast talan gjørdist um sigur til meistararnar, so var tað ikki uttan víðari, at sørvingarnir boygdu seg. Trý av teimum fýra settunum endaðu í mest sum reinum nervakríggi, men í tveimum av hesum førunum vóru tað heimamenninir, sum drógu longra stráðið, soleiðis at teir vunnu fjórða sigurin á árinum.

Sum sagt, so viðførdi dysturin, at Fram fyribils klintraði upp á næst ovasta sessin í deildini, men tað er tó langt ífrá víst, at teir verða hangandi her alt grundspælið á tamb. Sjálvir hava meistararnir kanska truplastu uppgávuna eftir, tá teir skulu vitja á Kambsdali. Klaksvíkingar hava hinvegin tríggjar dystir eftir á skránni, og av hesum eigur í øllum førum tann ímóti Fleyr at geva fulla úrtøku, meðan tað tykist eitt sindur meira óvist, hvussu dystirnir móti SÍ fara at tørna út.



# B68 og Føroya Tele halda fram



*Andras Róin og Niclas Davidsen skrivað her undir nýggju sponsoravtaluna millum Føroya Tele og B68. Aftan fyri síggjast Hans Fróði Hansen og Fróði Benjamsen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Nýggjur eitt ára stuðulssáttmáli varð undirskrivaður á Føroya Tele fríggjadagin í síðstu viku**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Føroya Tele verður eisini í nýggja kappingarárinum høvuðsstuðul hjá B68. Fríggjadagin varð sáttmáli undirskrivaður á høvuðsskrivstovuni hjá Føroya Tele. Tað vóru stjórin í Føroya Tele, Andras Róin, og formaðurin í B68, Niclas Davidsen, sum skrivaðu undir. Sáttmálin er galdandi fyri 2003.

At Føroya Tele og B68 samstarva er ikki nakað nýtt. Í 1999 varð tvey ára samstarvsavtala gjørd, og aftur í 2001 varð skrivað undir nýggja tvey ára samstarvsavtalu. Nú nýggja eitt ára avtalan er gjørd ber tað við sær, at B68 og Føroya Tele í hvussu so er tilsaman fara at samstarva í fimm ár.

Saman við formanninum í B68 og stjóranum í Føroya Tele vóru eisini onnur umboð hjástødd, tá ið nýggi sáttmálin varð undirskrivaður. Fyri B68 vóru nevndarlimirnir Martin Heinesen og Ólavur Jensen, og fyri Føroya Tele var Richard Mortensen, marknaðarleiðari, hjástaddur.

Harafturat vóru tveir av landsliðsspælarunum hjá B68 hjástaddir. Verjuspælarin Hans Fróði Hansen og miðvallarin Fróði Benjaminsen.

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 9 | 7 | - | 2 | 23 | 9 | 14 | 14 |
| 2 | ÍF | 9 | 7 | - | 2 | 25 | 12 | 13 | 14 |
| 3 | Mjølnir | 8 | 5 | - | 3 | 19 | 12 | 7 | 10 |
| 4 | Dráttur | 8 | 5 | - | 3 | 18 | 17 | 1 | 10 |
| 5 | KÍF | 9 | 1 | - | 8 | 7 | 24 | -17 | 2 |
| 6 | Fleyr | 8 | 1 | - | 7 | 6 | 24 | -18 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 7 | 7 | - | 0 | 21 | 0 | 21 | 14 |
| 2 | Fram | 7 | 4 | - | 3 | 14 | 10 | 4 | 8 |
| 3 | Mjølnir | 5 | 3 | - | 2 | 9 | 8 | 1 | 6 |
| 4 | SÍ | 6 | 2 | - | 4 | 7 | 12 | -5 | 4 |
| 5 | Fleyr | 7 | 0 | - | 7 | 0 | 21 | -21 | 0 |

## Føroyar móti Spania

Føroyska U-19 landsliðið hjá kvinnum skal aftur komandi ár royna seg í altjóða eldinum. Eftir frálíku úrslitini, sum kvinnurnar fingu fyrr í ár, er einki at siga til, at spenningurin til komandi kappingina er stórur, og tó at hetta ikki verður fyrr enn í september komandi ár, so er lutakastið til hesa nú longu greitt.

Føroyar skulu hesa ferð royna seg í kapping við Spania, Belgia og Bosnia-Herzeovina. Enn er ikki greitt, hvar dystirnir skulu leikast, men er hetta nakað, sum luttakandi londini fara at avgreiða sínamillum.

**-jm**

# Backe hevur longt sáttmálan við FCK

Hóast tað enn ikki er greitt, hvørt Todi Jónsson eisini komandi árini verður at síggja í FCK, so hevur felagið tó eisini aðrar sáttmálar at hugsa um.

Ein av hesum er sáttmálin við svenska venjaran hjá felagnum, Hans Backe. Hesin kom til í fjør heyst, eftir at felagið í nakrar mánaðir hevði stríðst við at fáa avloysaran fyri Roy Hodgson í rættlag, og síðani hevur tað gingið stútt framá hjá teimum hvítu leyvunum.

Teir gjørdust tó akkurát ov stuttir til at vinna Brøndby aftur í dystinum um DM-gullið í fjør, men í ár hevur eingin staðið teimum kurl, og eru teir trygt á odda í donsku superliguni, sum nú er farin í vetrarfrí.

Hóast vetrarfrí, so tykist tað kortini, sum um FCK-viðhaldsfólkini hava nóg mikið at frøst um í hesum døgum.

Fyri stuttum valdu donsku venjararnir sonevnda »efterårets profil« í donsku superliguni, og ta ferðina fall valið á verjuleikaran, Martin Albrechtsen, sum FCK fyri góðum ári síðani keypti úr AB.

Nú um dagarnar vóru tað so leikararnir í donskum fótbólti, sum skuldu gera av, hvør teirra var hin besti í 2002, og hesin heiður fall til ídna miðvallaran, Thomas Røll.

**- jm**

## Smyril Line og Neistin halda fram



*Dánjal Pauli Mohr vegna Neistan og Áki Jespersen vegna Smyril Line hava aftur í heyst tikið hond upp á samstarvið kring besta kvinnulið felagsins*

Smyril Line og Neistin hava aftur í heyst gjørt avtalu um høvuðssponsorat fyri komandi kappingarár.

Frá bæði Neistnum og Smyril Line verður sagt, at tey eru vøl nøgd um nýggju avtaluna, usm umframt geva Neistanum eitt fíggjarligt ískoyti eisini skal virka sum ein liður í marknaðarfremjandi arbeiðinum hjá ferðavinnufelagnum.

# Ingi spælir aftur

Føroyski Arsenal-leikarin, Ingi Højsted, hevur stóran part av hesum árinum drigist við skaða, sum hevur hildið hann burtur frá bæði venjing og dysti, men nú røkist endiliga fyri, at miðvallarin er um at vera tøkur aftur.

Eftir at hann í vikuni stóð sera væl undir venjing, og millum annað skeyt tvey mál í dysti millum eykaliðini hjá felagnum var Ingi millum teir fyrstu ellivu, tá U-17 liðið hjá Arsenal leikti móti Charlton.

Úrslitið av dystinum gjørdist, at Ingi og teir taptu 4-3, men úr einum føroyskum sjónarhorni er kortini hugaligt at staðfesta, at støðan var 3-2 til Arsenal, tá Ingi Højsted 20 minuttir fyri leiklok varð skiftur út. Útskiftingin var sum skilst væntandi, tí umframt drúgva skaðasteðgin, so var Ingi eisini hálv-sjúkur í døgunum upp til dystin, men sjálvan dystardagin var hann kortini somikið bigur, at hann setti seg føran fyri at spæla.

Arsenal er í løtuni á øðrum plássi í ensku kappingini fyri U-17 lið. Teir hava 22 stig fyri 12 dystir. Á odda er Aston Villa, sum hevur 32 stig fyri 14 dystir.

**-jm**